VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlógin fyri framman

**Kristina Háfoss**
*Framsøgufólk Tjóðveldisfloksins í fíggjarmálum*



Einhvør fíggjarlóg byggir á herðarnar á undanfarnu fíggjarlógum og er fíggjarlógin fyri 2003 onki undantak í so máta. Hetta er at gleðast um, tí búskaparliga grundarlagið hjá føroyska samfelagnum er vorið alsamt sterkari seinastu árini, og hevur Føroya Løgting tí 9. ár á rað haft 1. viðgerð av eini fíggjarlóg, ið gevur yvirskot - eini fíggjarlóg, ið lýsir ein støðugt meira sjálvberandi búskap og eini fíggjarlóg, ið raðfestir almanna-, heilsu-, útbúgvingar-, granskingar- og mentamál hægst.

**Fíggjarlógin eitt amboð at náa málum**

Fíggjarætlanin telur góðar 400 síður við tølum, men fíggjarætlanin er í veruleikanum alt annað enn tøl. Tí uttan visiónir og málrættaðar ætlanir kámast endamálið við býtinum av krónum og oyrum skjótt. Fíggjarlógin skal tí bert síggjast sum eitt amboð til at náa teimum málum, ið samgongan hevur sett sær. Hetta sæst eisini aftur í fíggjarlógar-uppskotinum - í hvørtfall í ávísan mun.

Nógv eru málini, ið samgongan hevur sett sær fyri og fari eg ikki at nevna øll her, men í samband við, at fullveldiskósin er vend á høvdið - frá at vinna politiska frælsið fyrst - til nú at vinna búskaparliga frælsið fyrst - hevur Tjóðveldisflokkurin trý høvuðsmál við hesi samgongu, til tess at koma nærri føroyskum fullveldi:

1) Fremja yvirtøkur
2) Fremja ein sjálvberandi búskap
3) Raðfesta vælferð, virðir og virksemi hægst í Føroyum, soleiðis at vit kunnu menna einar enn betri Føroyar fyri allar føroyingar.

Hóast fíggjarlógin fyri 2003 ikki myndar øll hesi mál eins væl og ynskt var - so er fíggjarlógin eitt gott amboð at náa hesum málum.

**Yvirtøkur í komandi valskeiði**

Tað er ongin loyna, at Tjóðveldisflokkurin hevði ynskt fólkaatkvøðu og politiskt frælsi - heldur enn núverandi heimastýrisloysn við yvirtøkum. Men politiska samansetingin ger núverandi æltan neyðuga. Samgongan hevur tó raðfest nógvar yvirtøkur komandi árini og gongur alt sum ætlað, fær Føroya Løgting lóggevandi valdið á hesum økjum í 2003:

- Fólkakirkjuni
- Á vinnuøkinum
- Persóns, familju- og arvarættarligu økjunum
- Útlendingaøkinum

Í mars 2003 verður partur av fyrireikingararbeiðnum at yvirtaka løgreglu og rættarskipanini liðugt og tí, kann farast undir stigvísa yvirtøku longu næsta ár.

Eisini verða aðrar yvirtøkur óivað framdar, tí flestu av smáu nevndu yvirtøkumálunum í samgonguskjalinum krevja meira ella minni bert eina undirskrift fyri at verða yvirtikin.

**Nærri sjálvberandi búskapi**

Tá umræður raðfesting av einum sjálvberandi búskapi - so er nú prógvað 2. ár á rað, at føroyski samfelagsbúskapurin virkar til fullnar uttan tær 366 mió. í stuðli uttanífrá. Allar ræðusøgurnar um, hvat fór at henda tá ríkisstuðlin varð skorin við 366 mió. kr. eru gjørdar til onkis.

Tí føroyingar hava prógvað, at teir megna at virka og framleiða tað, ið er neyðugt soleiðis, at føroyska vælferðarsamfelagið støðugt kann mennast og støðugt kann gerast meira óheft av stuðli úr Danmark.

Tað er tó heldur ongin loyna, at Tjóðveldisflokkurin hevði ynskt ein framhaldandi positivan niðurskurð í ríkisstuðlinum, men hetta var ikki politiskur meirluti fyri í samgonguni. Í staðin verður ríkisstuðulin fastfrystur og halda inntøkur landsins áfram við at vaksa, fer ríkisstuðulin soleiðis at gerast støðugt minni partur av inntøkum landsins komandi árini.

Í 1997 var ríkisstuðulin úr Danmark heili 32% av inntøkum landskassans - í 2003 verður ríkisstuðulin bert 17% av inntøkunum. Nevnast kann eisini, at í sama tíðarskeiði er framleiðsluvirðið - ella Bruttotjóðarúrtøkan - økt úr 6,2 mia. uppí meira enn 10 mia.

Ein niðurskurður av ríkisstuðlinum á góðar 600 mió. fær sostatt alsamt minni týdning búskaparliga.

Tað, ið eisini er áhugavert er, at hyggja vit at tíðarskeiðnum 1997-2003 sæst, at inntøkur landskassans (uttan ríkisstuðulin) eru øktar úr 1,9 mia. í 3,1 mia. tvs. við 1,2 mia. kr. - í sama tíðarskeiði er ríkisstuðulin minkaður úr 898 mió. í 630 mió. tvs. við 268 mió.

Tað er tí ikki rætt tá eitt nú Sambandsflokkurin sigur, at inntøkurnar ikki eru vaksnar samsvarandi við niðurskurðin í ríkisveitingini - inntøkur landins eru vaksnar fleirfaldað tað upphædd, ið ríkisstuðulin er minkaður - verður hugt at seinastu 6 árunum. Hartil skal havast í huga, at landskassin hevur haft yvirskot á 600-650 mió. seinastu 3 árini og minkingin í ríkisstuðlinum hevur tí bert merkt minni yvirskot. Talan er sostatt ikki um skerjingar í játtanum, men bert av skerjing av einum yvirskoti.

**Almanna-, heilsu-, útbúgvingar-, granskingar- og mentamál raðfest hægst**

Tá umræður málinum um, at raðfesta sosialu trygdina og vælferðina hægst, so myndar fíggjarlógin hetta málið væl. Tí tað eru almanna-, heilsu-, útbúgvingar-, granskingar- og mentamál, ið fáa hægstu raðfesting á komandi fíggjarlóg.

Sum víst hevur verið á ofta fyrr, so eiga vit at meta eitt samfelag eftir, hvussu tað tekur sær av teimum veikastu - og tí kunnu vit verða stolt av raðfestingini í komandi fíggjarlóg.

Til nýggjan rakstur fáa eldra- og serforsorgarøkið umframt tey brekaðu 30 mió. eyka og somuleiðis fáa heilsumál 10 mió. kr. til nýggjan rakstur.

Nevnast kann eitt nú at hjálpartólarmiðstøðin, teknmálstulkatænastan, barnaforsorgin, Føroya Barnaheim og Meginfelag teirra brekaðu øll fáa økta rakstrarjáttan.

Vitanarliga og mentanarliga tilfeingið hevur avgerandi týdning fyri trivnað og framhaldandi menning í Føroyum og verða økini útbúgving, gransking og mentan eisini raðfest høgt - og fáa 18 mió. til nýtt virksemi.

**Skattalættar á góðar 50 mió. kr.**

Tá umræður raðfestingina av virksemi, so verður m.a. hildið áfram við at lætta um skattatrýstið eins og undanfarna samgonga gjørdi. Neyðugt er, at gera tað meira áhugavert fíggjarliga hjá fólki at verða virkin.

Tí skal inntøkuskatturin - serstakliga á lág- og miðalinntøkum, men eisini marginalskatturin - lækkast. Eisini skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáast at skilja, at tað er til gagns fyri allar føroyingar, at fáa skattalættar heldur enn ov stórar lønarhækkingar til frama fyri minni prísvøkstri og størri realløn. Ár 2003 verður talan um góðar 50 mió. kr. í skattalættum og ár 2004 verður talan um somu upphædd - harvið íalt 110-120 mió. kr. í skattalættum komandi tvey árini. Tað verður tó eitt krav fyri skattalættum, at neyðugu sparingarnar verða framdar.

**Raksturin gevur avlop á 410 mió.**

Fíggjarlógin vísir annars eisini, at raksturin gevur eitt yvirskot á 410 mió. Tí er rúm fyri íløgum á 260 mió. umframt gjald av avdráttum á 148 mió.

Yvirskotið á fíggjarlógini verður 150 mió. kr., men sokallaða likviditetsyvirskotið verður vegna avdráttir 2 mió. kr.

**Íløgur fyri 260 + 32,5 mió. kr.**

Á íløgusíðuni verða íløgur á útbúgvingar-, almanna- og heilsuøkinum eisini raðfestar hægri enn fyrr. Eitt nú skulu 40 mió. nýtast á Landssjúkrahúsinum, 12 mió. til miðnámsskúla í Vági, 20 mió. til ellis- og røktarheim o.s.fr..

Men á íløgusíðuni fyllir samferðsluøkið sum vanligt eisini nógv. Her eru tað serstakliga íløgurnar í nýggja Suðuroyarskipið og samferðsluhavnina á Tvøroyri, ið fáa hægstu raðfesting við heili 132 mió. kr. av samlaða íløgukarminum á 260 mió. kr.

Norðoyartunnilin er eisini ein verkætlan, ið haldast skal áfram við. Í hesum sambandi er ætlanin, at flyta part (32,5 mió.) av yvirskotinum á um 45 mió. á íløgukarminum fyri 2002 til hetta endamál.

**Neyðugt at tálma vøktri í rakstrarútreiðslum**

Við núverandi búskapargongd er greitt, at skal vælferðarsamfelagið Føroyar verða rikið við yvirskoti komandi árini er alneyðugt, at rakstrarútreiðslurnar ikki halda á við himmalferð síni.

Hetta eigur heldur ikki at verða neyðugt. Útreiðslur landsins eru øktar úr 2,6 mia. í 1997 uppí 3,6 mia. í 2003 - tvs. við 1 mia. kr seinastu árini. Vit nýta tí í dag so mikið nógvan pening pr. íbúgva - eisini í mun til grannalond okkara - at tað ikki er fíggjarligi spurningurin, ið forðar framhaldandi menning á ymsu samfelagsøkjunum. Neyðugt verður hinvegin við nýhugsan og nýskipan soleiðis, at enn meira fæst fyri skattgjaldarans pening og at grund verður løgd undir einum sjálvberandi føroyskum vælferðarsamfelagi.

**Sparingar á minst 100 mió. kr.**

Eitt yvirskot er onki mál, ið sjálvum sær, men tá málið er, at gerast sjálvberandi og gerast óheft av ríkisstuðlinum er m.a. neyðugt at arbeiða til frama fyri støðugt størri yvirskoti.

Skal fíggjarlógin 2003 hava eitt yvirskot á 150 mió. kr. - eisini aftaná at 50 mió. eru latnar í skattalættum afturat, at góðar 20 mió. verða latnar eldra-, serforsorgar-, útbúgvingar-, granskingar- og familjuøkinum, tá sparingar eru framdar v.m. - verður helst neyðugt við minst 100 mió. kr. í sparingum. Hesar skulu fremjast við rationaliseringum í almenna sektorinum, avtøku av studningsskipanum innan vinnulívið, samskipan av almennum innkeypi o.s.fr. Eisini eiga vit at økja um inntøkuskapanina í Føroyum.

Tað er altíð lættari at nýta - heldur enn at spara pening. Men eins og gjørt verður í einum húsarhaldi, eini fyritøku og aðrastaðni, so eigur eisini Løgtingið og landsstýrið støðugt at endurskoða skipanir og tryggja, at føroyingar fáa sum mest burturúr tí peningi, ið er latið Løgtinginum upp í hendur at umsita.

**Fult sjálvbjargni er málið**

Tað skal verða mín vón, at fíggjarlógin fyri 2003 aftaná triðju og harvið seinastu viðgerð á Løgtingi, vil verða ein fíggjarlóg, ið raðfestir vælferð, virðir og virksemi - og mest av øllum ein fíggjarlóg, ið er grundað á ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk, ið kann bera føroysku tjóðina fram ímóti fullum sjálvbjargni.

# Hjartasuff úr Tvøroyrar skúla

**vegna lærararnar**

*Karin Maria Thorsteinsson, lærari og skúlastýrislimur*

Árið í ár er sett til at vera "Árið hjá tí góða fólkaskúlanum". Hetta kunnu vit lærarar bert fegnast um, men stokkut er gleðin, tá ið hugsað verður um hvørji høli Tvøroyrar kommuna bjóðar sínum yngru børnum, í tí gamla partinum av Tvøroyrar skúla, har barnaskúlin heldur til. Hesi høli eru so niðurslitin, at hol eru í loftum og veggjum, gólvini slitin, málingin skalla av, ongin ventilatónsskipan og harav vánalig luft inni í stovunum. Hetta eru ting, ið vit lærarar og næmingar hava vant okkum til.

Í fleiri ár hava vit fingið at vita, at kommunan hevur ikki ráð at gera nakað við tann gamla partin av skúlanum. Vit hava verið tolin, tí er hetta veruliga so, ja so noyðast vit at góðtaka hetta!

Nú frættist so, at tann nýggi "Almanna - og Heilsuskúlin" skal hava tvey høli burturav í tí gamla partinum av skúlanum. Lat okkum sláa fast, at vit eru fegin um, at Heilsuskúlin er í Suðuroy, og skal hetta ikki síggjast sum eitt álop á henda. Hesi áttu at fingið betri sømdir enn, at vaksin fólk verða kroyst inn í skúlan ímillum 7-12 ára gomul børn.

Tvøroyrar kommuna hevur nú játtað Heilsuskúlanum tvey høli í gamla parti av skúlanum. Hesi somu høli, ið kommunan heldur vera nóg góð til okkara framtíð - tey yngru skúlabørnini - kunnu nú ikki nýtast til Heilsuskúlan! Nei, nú hevur kommunan knappliga ráð at seta hesi bæði hølini - **og bert hesi tvey** - í stand.

Slíkur mannamunur er fallin okkum lærararum (og eisini skattaborgarum) fyri bróstið, og skilja vit ikki:

- At kommunan skal virða okkara næmingar - børn skattaborgaranna - so lítið.
- At kommunan skal sleiska fyri einum stovni, ið kommunan als ikki varðar av.
- At trivnaðurin hjá heilsuskúlanæmingum er týdningarmeiri enn trivnaðurin hjá egnum borgarum.
- At kommunan nú kann útvega fígging til at gera hølir í stand til fremmand og ikki til síni egnu.

Heldur skuldi Tvøroyrar kommuna syrgt fyri:

- At børn **okkara** fyrst og fremst fingu vælhildin og hugnalig hølir at búleikast í.
- At skattaborgarar her í kommununi fingu nakað fyri **sínar egnu** skattakrónur.
- At víst tí stovni, ið varðar av Heilsuskúlanum, á **sína ábyrgd.**

At enda vilja vit heita á Tvøroyrar býráð, um at taka sær um reiggj og **fyrst og fremst** taka sær av teimum, ið teir eru valdir at umboða.



VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Høgna Hoydal, landsstýrismann, viðvíkjandi navnalógini og kunngerð um uppkalling

**Jógvan á Lakjuni**



*Ár 2002, týsdagin 24. september, boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvan á Lakjuni, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:*

**Fyrispurningur**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær fer landsstýrismaðurin at broyta kunngerðina um uppkalling, so hon lýsir hugtakið, "í ættini" eftir vilja Løgtingsins og samsvarandi føroyskari mentan?
2. Hvørji málvísindalig fyrilit nýtir navnanevndin, tá ið hon avger, hvørji nøvn koma á tann góðkenda navnalistan? Hví eru t.d. mannfólkanøvnini, Olaf og Oluf ikki á listanum, tá ið konufólkanavnið, Oluffa, er?

**Viðmerkingar til 1:**

Í seinastu tingsetu var navnalógin ikki minni enn tvær ferðir til viðgerðar á tingi. Fyrru ferð legði landsstýrismaðurin sjálvur lógina fram, men av tí at Løgtingið ikki hevði somu meining um tingini sum landsstýrismaðurin, tók hann málið aftur. Meirilutin í Rættarnevndini hevði kortini lúrt landsstýrismannin av og legði málið fram av nýggjum í so góðari tíð, at tað kundi viðgerast og samtykkjast, áðrenn tingið fór heim.

Og við tingmáli 86/2001 broytti Løgtingið lógina um fólkanøvn soleiðis, at hon skuldi svara til føroyska mentan og føroyskan navnasið, har foreldur fingu sín sjálvsagda rætt og sítt sjálvsagda persónliga frælsi til uppkalling aftur.

Samtykt varð at seta inn í §2 hesa áseting um at kalla upp í ættini:

*Stk. 4: Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk.*

28. juni í ár hevur landsstýrismaðurin í løgmálum lýst kunngerð, ið avmarkar uppkalling sera nógv - uttan iva nógv meira enn Løgtingið hevur ætlað. (Kunngerðin er hjáløgd sum skjal). Eftir hesi kunngerð er nógv, ið ikki er loyvt í sambandi við uppkalling í ættini. Her eru nøkur dømi:

1. dømi:
Langabbin eitur Andreas. Langabbasonurin kann ikki stavrætt verða uppkallaður eftir honum. Men tað kann abbasonurin.

2. dømi:
Langabbin eitur Olaf. Langabbasonurin kann ikki verða uppkallaður eftir honum. Men tað kann abbasonurin.

3. dømi:
Abbin eitur Victor. Abbadóttirin kann ikki eita Victoria. Men abbasonurin kann kallast Victor.

4. dømi:
Doyr ein pápabeiggi, sum t.d. eitur Christian, eftir langa sjúkralegu, kann bróðursonurin ikki uppkallast stavrætt eftir honum, men letur hann lív undir óvanligum umstøðum, fær bróðursonurin ivaleyst loyvi at eita Christian.

Løgtingið má í hesum máli ásanna, at landsstýrismaðurin ikki hevur hildið seg til sína heimild, men hevur avmarkað lógarásetingina ímóti vilja løgtingsins. Tí fyri ein og hvønn, sum er vaksin upp í føroyskari mentan, er *" fólk í ættini"* eitt nógv breiðari hugtak enn foreldur, ommur og abbar. Bara hugtakið, "familjan", ið er trengri enn "ættin", fevnir víðari enn henda lðsing, og hugtakið "ættin" er eftir føroyskari fatan nógv víðfevndari, enn "ættin" er eftir kunngerðini hjá landsstðrismanninum.

Ein og hvør, ið trúfast vil skilja tingsins vilja, vildi lðst hugtakið bæði víðari, og tikið við langommur/abbar og oldurommur/abbar, og breiðari, við at tikið við systkin hjá øllum teimum nevndu. Og Løgtingið eigur - óheft av hvat tingmenn halda um navnalógina - at vera samt um at átala, at ein landstýrismaður á henda hátt nýtir høvið at broyta lógina, tá ið einasta heimild hansara er at gera nærri reglur um tulking og mannagongdir samsvarandi tingsins vilja og fatan.

**Viðmerkingar til 2:**

Tá ið hugt verður í tann góðkenda navnalistan, er sera trupult at skilja, hvørji málvísindalig fyrilit navnanevndin tekur, tá ið hon avger, hvørji nøvn verða góðkend.

Tað er kanska óheppið at taka ávís nøvn fram í einum slíkum fyrispurningi, men eg fari kortini at biðja landsstðrismannin greiða frá, hvussu navnanevndin kann nokta fyri, at mannfólkanøvnini, Olaf og Oluf, verða góðkend og sett á navnalistan.

Orsøkin til, at nøvnini Olaf og Oluf ikki eru á tí góðkenda listanum, er ivaleyst, at tann norrøni formurin, Ólafr, á føroyskum er vorðin til Ólavur, og at formarnir, Oluf og Olaf, ígjøgnum danskt eru komnir inn í føroyskt. Hetta verður allarhelst tulkað soleiðis, at hesir formar eru í stríð við føroyskar málreglur, ið sambært §1, stk.3 í løgtingslóg um fólkanøvn er einasta grund fyri ikki at góðkenna eitt navn, um tað annars ikki er fólki til ampa.

Men blaða vit ígjøgnum navnalistan og síggja, hvørji nøvn eru loyvd, so er torført at skilja, hvørji argument skulu vera fyri ikki at góðkenna nøvn sum Olaf og Oluf. Taka vit t.d. tey føroysku nøvnini, Hanus, Janus og Sjúrður, so hava tey á sama hátt sum Ólavur fingið ein danskan/útlendskan form, Hans, Jens og Sigurd, og hesi nøvn eru góðkend.

Nú veit eg ikki, hvussu reglan um at vera í samljóði við føroyskar málreglur verður tulkað, men tá ið nøvn sum Adolf, Amadeus, Gustav, Urbanus og Vilhelm eru á navnalistanum og tískil mugu vera í samljóði við føroyskar málreglur, so er ringt at skilja, hví nøvnini, Olaf og Oluf, ikki skulu vera tað! Her kann verða nevnt, at sambært 14. Sept. nr. 9 í 1992 vóru tað umleið 100 føroyingar, sum annaðhvørt itu Olaf ella Oluf.

Tað, sum allarmest undrar, tá ið tú kagar ígjøgnum navnalistan, er, at konufólkanavnið, Oluffa, er á tí góðkenda listanum. Ikki tí, at tað ikki er eitt gott navn, men her hava vit eitt dømi, sum er fullkomiliga meinlíkt og analogt við Olaf og Oluf. Tann norrøni formurin var Ólof, á føroyskum er tað vorðið Óluva, men vit hava ivaleyst ígjøgnum tað danska Oluf fingið konufólkanavnið, Oluffa. Hví hevur konufólkanavnið rætt í føroyskari navnagávu, men ikki mannfólkanøvnini?

Eisini hevði verið áhugavert at fingið at vitað, hví t.d. navnið, Paula, er á tí góðkenda navnalistanum, men ikki Paul, og hvussu tað ber til at gera av, um eitt hebraiskt navn skal skrivast við e ella i - t.d. Andrias heldur enn Andreas - serliga tá ið bæði Jóannes og Jóannis eru loyvd.

Kann landsstýrismaðurin greiða Løgtinginum frá, um semja er ímillum málfrøðingar um hugtakið, føroyskar málreglur, í hesum høpi, ella talan bara er um hugsjónarliga støðutakan (málpolitikk) hjá navnanevndini.

**SKJAL:** Kunngerð um Uppkalling

**KUNNGERÐ NR. 71 FRÁ 29. JUNI 2002 UM UNDANTAK TIL NAVNAUPPKALLING**

Við heimild í § 2, stk. 4 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn verður ásett:

**§ 1.** Er navn ikki í samsvari við § 2, stk. 2 í lógini, kann navnanevndin eftir umsókn í sambandi við navnagávu kortini loyva navnið, tá ið tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins. Navnanevndin kann eisini í serligum føri gera undantak til uppkalling av systkjum hjá barni ella systkjum hjá foreldrum, ið lata lív undir óvanligum umstøðum.

**§ 2.** Umsókn um undantaksloyvi til uppkalling, sum nevnt í § 1, skal verða send navnanevndini skrivliga.
*Stk. 2.* Umsøkjarin skal veita navnanevndini skjalprógv um navnið á viðkomandi ættarfólki og sambandi tess við barnið.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 28. juni 2002

Høgni Hoydal, (sign.), landsstýrismaður.

*Á tingfundi 25. september 2002 var uttan atkvøðugreiðslu samtykt, at fyrispurningurin skal svarast.*

# Viðvíkjandi lógararbeiðnum at umskipa P/F Føroya Lívstrygging

TÍÐINDASKRIV

Starvsmannafelagið hevur sent Anfinni Kallsberg, løgmanni soljóðandi skriv:

"Feløgini í Samtakinum, ið eru gingin saman til tess at tryggja áhugamálini hjá limum sínum sum tryggingartakarar og eftirlønaruppspararar í LÍV, fegnast um tann dent, ið løgmaður legði á eftirlønarspurningin í Ólavssøkurøðuni og á løgtingssamtyktina um at umskipa Føroya Lívstrygging, so at tryggingartakararnir fáa fulla ávirkan og innlit.

Áherðsla hevur verið løgd á, at fakfeløgini mugu medvirka konstruktivt í hesum stórmálum, ið krevja umfatandi og langtrøkkandi semjur bæði á arbeiðsmarknaðinum og millum politisku flokkarnar á tingi.

Feløgini í Samtakinum eru so avgjørt sinnað at medvirka konstruktivt og meta, at hesi mál eru millum størstu mál hjá fakfelagsrørsluni í nýggjari tíð. Samstundis vilja vit gera greitt, at vit kunnu ikki góðtaka, at fýra ár fara afturat undir tygara politisku leiðslu uttan at nakað ítøkiligt spyrst burturúr.

Eins og løgtingssamtyktin ásannar, at tað er alneyðugt at fólk taka undir við og taka til sín eftirlønarskipanir í Føroyum, skulu framstig gerast á eftirlønarøkinum, so vilja feløgini enn einaferð endurtaka, at høvuðsfortreyt fyri eini loysn liggur í eini skipan av LÍV, so eftirlønaruppspararar fáa veruliga ávirkan á hesi viðurskifti síni, eins og vit kenna tað í londunum rundanum okkum.

Umboð fyri feløgini royna nú á triðja ári at fáa eina samráðingarloysn við landsstýrið um LÍV, men higartil hevur konstruktivur vilji skortað frá landsstýrisins síðu at medvirka til loysn.

Feløgini í Samtakinum vilja tí heita á løgmann við ábyrgd at samskipa politikkin á økinum at síggja til, at neyðugu lógarbroytingarnar verða gjørdar í hesum árinum, so broytt lóg fyri LÍV kann koma at virka frá ársskiftinum.

Gongdin í heimsbúskapinum seinasta árið hevur givið LÍV týðandi trupulleikar. Limirnir hjá feløgunum, sum kunnu verða útsettir fyri stórum tapum, tola sum vera man ikki, at drálað verður longur við at geva teimum fult innlit í hesi viðurskifti og avgerandi ávirkan á, hvussu uppsparingin verður umsitin. Samstundis vilja vit gera greitt, at landsstýrið eftir okkara hugsan hevur ábyrgdina av teimum tapum, sum tryggingartakarin hevur liðið síðani ognartøkuna 1. januar 2000."

Vinarliga

**Vegna Fakfeløgini í Samtakinum:**

Starvsmannafelagið
SFS (starvsfólkafelag fíggjarstovanna)
Føroya Lærarafelag
Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Maskinmeistarafelagið
BLF (Búskapar- og Løgfrøðingafelagið)
Føroya Almanna- og Heilsurøktarfelag
Føroya Pedagogfelag
YF (Yrkisfelag HF- og studentaskúlalæraranna)
Magistarafelagið
Yrkisfelagið Trygdin
Føroya Postfelag
Føroya Fiskimannafelag
Føroya Verkfrøðingafelag

Jógvan Mørkøre

Gunnleivur Dalsgarð,

Andrias Ziska

Leif Ellingsgaard